# Skattalættin kann føra til verkfall í vár

**Skattalættin, sum nú er samtyktur, kann gera, at lønarkrøvini fara at verða størri enn tey annars høvdu verið, tá ið samráðingar um nýggjan sáttmála verða í vár, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**

SKATTALÆTTI OG LØNARKRØV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er ómetaliga óheppið fyri friðin á arbeiðsmarknaðinum.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, stúrir fyri, at skattalættin, sum nú er samtyktur, fer at elva til trupulleikar á arbeiðsmarknaðinum, tá ið sáttmálasamráðingar verða aftur við arbeiðsgevararnar í vár.

Men verða verkfall ella aðrir trupulleikar í samráðingunum í vár, ivast hann heldur ikki í, hvør hevur skyldina.

– Fara trupulleikar at stinga seg upp í samráðingunum í vár, er tað ein trupulleiki, sum politikararnir hava skapt. Sostatt mugu tey, sum hava samtykt skattalættan, eisini átaka sær skyldina, skuldi verkfall ella annar ófriður tikið seg upp í lønarsamráðingunum í vár.



Hans Joensen vísur á, at við skattalættin fær ein við háinntøku fleiri ferðir so stóran skattalætta, sum eitt tímalønt verkafólk.

– Sostatt hava landsstýrið og Løgtingið gjørt gjónna ímillum tey tímaløntu og tey vælbjargaðu í samfelagnum enn størri enn hon var frammanundan.

Og fyri tveimum árum síðani vóru arbeiðarafeløgini í drúgvum verkfalli, júst tú tey ikki vildu góðtaka, at gjógvin ímillum tey tímaløntu og tey háløntu bleiv størri.

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmananfelag førdi ferð eftir ferð fram, at hetta var høvuðsorsøkin til verkfallið seinast og sostatt vórðu lønarkrøvini, sum tey vóru.

Tí heldur hann, at skattalættin, sum nú er samtyktur, og sum gevur einum vælbjargaðum ferðir so stóran skattalætta sum einum tímaløntum, er ómetaliga óheppin fyri friðin á arbeiðsmarknaðinum, nú beint uppundir samráðingarnar, sum verða longu síðst í apríl.

Um skattalættin fer at føra til at lønarkrøvini fara at verða hægri enn tey annars høvdu verðið, veit hann ikki.

– Eg eri ikki einsamallur um at áseta lønarkrøvini. Men eg standi fast við sjónarmiðið um, at gjógvin ímillum lágløntar og háløntar føroyingar má ikki veksa. Tí skal ongin ivi verða um, at stendur tað til mín, verða lønarkrøvini sett somikið høg, at gjógvin minkar aftur.

Men hann væntar, at arbeiðarafeløgini fara at tosa saman um støðuna í góðari tí uppundir samráðingarnar í apríl.

*Skattalættin, sum nú er samtyktur, er ómetaliga óheppin fyri friðin á arbeiðsmarknaðinum, heldur hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

### Meiri neyðugt enn nakrantíð

Annars hevur Hans Joensen ferð eftir ferð gjørt seg til talsmann fyri, at arbeiðarafeløg, arbeiðsgevarar og landsstýrið fara undir trýpartasamráðingar um lønarvøkstur og skattapolitikk fyri at linka trýstið á lønirnar.

Hann heldur, at skattalættin, sum nú er latin, vísur, at tað er tað hevur størri týdning nú enn tað nakrantíð hevur havt.

– Hetta vísur, at hvørja ferð er tað arbeiðarin, sum er við sviðusoð. Samstundis veksur gjógvin ímillum arbeiðaran og tey vælbjargaðu meiri og meiri.

– Og fáa vit ikki trýpartasamráðingar í lag um viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, kemur ikki broyting í, sigur hann.

Tí harmast hann um, at tað ikki er so frægt, at fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum kunnu semjast um slíkar trýpartasamráðingar.

Hann vil ikki siga tað sjálvur, men hann sipar til forkvinnuna í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum hevur ført fram, at skattapolitikkur og lønarsamráðingar eru hvør sítt mál, sum ikki skulu blandast saman og sum tískil heldur ikki tekur undir við trýpartasamráðingum.

– Hesuferð eru tað ikki arbeiðsgevararnir, sum hava víðkað gjónna ímill um verkafólkið og hava økt stættarmunin í Føroyum.

– Tað eru politikararnir og hetta vísur, hvussu neyðugt tað er hjá okkum at fáa politiskt forstáilsi fyri okkara støðu. Fáa vit ikki tað, eru als ongi útlit fyri at stættarmunurin í føroyum fer at minka.

Hans Joensen heldur eisini, at skattalættin vísur somuleiðis, at verkafólkið eigur ongan góðan í politikki í dag og tí eru vit so ómetaliga illa fyri. Sjálvt javnaðarflokkurin, sum er sprottin úr arbeiðararørsluni, hevur gjørt ein rossahandil fyri at sleppa í samgongu og tað er skattalættin eitt urslit av.

– Men so mikið størrri týdning hevur tað, at vit fáa viðurskiftini í rættlag við trýpartasamráðingarnar, tí tá ið vit ikki hava nakran sum røkir okkara áhugamál politiskt, mugu vit gera tað sjálvi.

# Hetta var dýrt keypt hjá javnaðarflokkinum

**Enn einaferð er staðfest, at tey, sum siga seg umboða verkafólkið í politikki,altíð eru til reiðar at selja seg sjálvi fyri at varðveita maktina, heldur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag**

SKATTALÆTTIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta var dýrt keypt hjá javnaðarflokkinum.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, er ógvuliga vónbrotin av, at samgongan, við javnaðarflokkinum á odda, samtykti skattalættan, soleiðis sum hann er orðaður. Soleiðis sum skattalættin er snikkaður saman, verða tað tey vælbjargaðu, sum fáa nógv tann største skattalættan, samstundis sum tey tímaløntu fáa lítlan og ongan lætta.



*– Hetta var væl javnað av javnaðarflokkinum, sigur ein sera vónsvikin Ingeborg Vinther*

Sostatt hevur samgongan, við javnaðarflokkinum á odda, staðfest, at stættarmunurin í Føroyum skal økjast enn meiri enn hann er, sigur Ingeborg Vinther. Men hon sigur samstundis, at hon enn einaferð staðfestir, at tá ið tað kemur til stykkis, eigur verkafólkið ongan góðan í politikki.

– Tá ið sonevndu arbeiðaraflokkarnir, javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin, sita í andstøðu, eru tey altíð fús at halda við verkafjøldini. Men so skjótt teir koma í samgongu, eru teir til reiðar at selja síni sjónarmið fyri at varðveita maktina.

– Hetta høvdu vit ikki væntað at javnaðarflokkinum, sigur Ingeborg Vinther.

– Og tað, sum vit nú hava staðfest, er, at løgtingslimir og landsstýrislimir hjá javnaðarflokkinum hava givið sær sjálvum og hinum hágløntu í samfelagnum, ein skattalætta upp á 6000 krónur um árið, samstundis sum tey lágløntu verkafólkið fingu einar 800 krónur um árið.

– Tað er væl javnað, heldur Ingeborg Vinther.

Men nú siga javnaðarmenn, at afturfyri skattalættan, hava teir fingið hinar flokkarnar at góðtaka, at samhaldsfasti eftirlønargrunnurin hækkar mundandi. Er tað ikki eitt plástur á sárið?

– Eg veit ikki. Vit taka altíð undir við, at bøtt verður um eftirlønarviðurskiftini. Men eg haldi, at samhaldsfasti var dýrt keyptur hjá javnaðarflokkinum. Vit droymdi ikki um, at prísurin fyri at hækka samhaldsfasta, eisini skuldi vera ein skattalætti til tey vælbjargaðu. Tað droymdu vit ikki um, at javnaðarflokkurin fór at góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

Vildi tú kanska heldur, at samhaldsfasti ikki varð hækkaður, nú tú heldur at prísurin var so høgur?

– Tað vil eg ikki siga, tí tað er avgjørt tørvur á at bøta um eftirlønarviðurskiftini. Men eg haldi, at javnaðarflokkurin hevur boygt seg alt ov langt, heldur Ingeborg Vinther.

### Hava beint fyri trýpartasamráðingunum

Í aðrari grein um skattalættan, heldur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, at hetta vísir, at tað nú er meiri neyðugt enn nakrantíð við trýpartasamráðingum.

Hinvegin heldur Ingeborg Vinther, at við skattalættanum hevur landsstýrið beint fyri øllum møguleikum fyri trýpartasamráðingum.

– Soleiðis sum landsstýrið hevur borið seg at, ber als ikki til at tosa um trýpartasamráðingar. Við at geva lágløntum 800 krónur í skattalætta og sær sjálvum 6000 í skattalætta, hava tey tikið grundarlagið undan trýpartasamráðingum.

Nú er tað ongin loyna at tú hevur stuðlað javnaðarflokkin. Er hetta at ganga verkafólki so nær, at at tú fer at umhugsa tína støðu í flokkinum?

– Tað havi eg als ikki tikið støðu til ella umrøtt yvirhøvur!

Ingeborg Vinther staðfestir kortini, at øll hesi seinastu árini er stættarmunurin alsamt øktur í Føryum, tí lønarhækkingar verða altíð roknaðar í prosentum.

Og 10% í lønarhækking av eini høgari inntøku er nógv meir enn 10% av eini lágari inntøku.

– Nú kemur so skattalættin og gevur háginntøkum stóran skattalætta og sostatt økist stættarmunurin enn meir.

Men um hetta fer at ávirka lønarsamráðingarnar í vár, veit hon ikki.

– Arbeiðarafeløgini fara at tosa saman um, hvussu tey skulu fyrihalda sær í samráðingunum við arbeiðsgevararnar, um tey skulu samráðast saman og, hvørji feløg skulu samráðast saman. Og tá fara vit eisini at tosa um lønarkrøvini og fyrrenn tá, ber ikki til at siga nakað um lønarkrøvini.